


*Nýggi Smyril nýmálaður. Um tvær vikur fer hann fyrsta royndartúrin. Møguleiki er fyri, at hann verður latin Strandferðsluni longu um mánaðarskiftið - um arbeiðið gongur væl. Men seinasta freistin er 15. oktober*

# Nú er Smyril málaður



*Opið er inn á bildekkið, sum rúmar 200 bilum*

**Roknast kann við, at nýggi Smyril verður latin av skipasmiðjuni í Spania um mánaðarskiftið september/oktober. Hann skal í øllum førum verða klárur til 15. oktober. Veitsluhaldið í sambandi við móttøkuna verður á Tvøroyri**

NÝGGI SMYRIL
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

– Nú líður sera væl við Smyrli. Málaraarbeiðið er við at verða liðugt, og fyrsti royndartúrurin verður eftir ætlan 24. september, sigur Kristian Davidsen, stjóri á Strandferðsluni.

Hann væntar, at royndartúrarnir fara at varða nakrar dagar. Síðani skulu síðstu tillagingarnar gerast, áðrenn skipið verður latið Strandferðsluni.

– Teir hava latið okkum skilt, at møguleiki er fyri, at skipið verður latið einar tvær vikur fyri ásettu tíðina, sum er 15. oktober, sigur Kristian Davidsen.

Tá skipið verður klárt, verður eitt lítið hátíðarhald á skipasmiðjuni í Spania. Men stóra móttøkan í Føroyum verður á Tvøroyri, sum verður fyrsta føroyska havn, ið fer at taka ímóti skipinum.

Tá núverandi Smyril kom til Føroya á fyrsta sinni í 1975, legði hann eisini fyrst inn á Tvøroyri, men tá slapp hann ikki at bryggju, tí útróðrarmenn í verkfalli forðaðu skipinum at leggja at, sum tí kom til Havnar.

– Men soleiðis verður valla hesaferð, heldur strandferðslustjórin skemtandi.

Sum útgangsstøðið verður ferðaætlanin tann sama, tá nýggja skipið verður sett í sigling.

– Suðuroyingar hava tó ynskt fleiri túrar, men tí er ikki lagt upp fyri í fíggjarlógini, sigur Kristian Davidsen, sum leggur afturat, at spurningurin ikki er liðugt viðgjørdur politiskt.





*Partur av salongini og messan eru rættuliga við at taka skap*